

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 06 - 2012

# Føroyingar við tá Cosl Pioneer borar

PAM Offshore í Havn hevur starvsfólk umborð á COSL Pioneer, nú pallurin fer at bora í føroyskum sjógvi í næstum. Fyritøkan, sum er partur av MEST samtakinum, hevur annars í hesum døgum fleiri av sínum starvsfólkum knýtt at virkseminum hjá COSL í Noregi, hvørs móðurfelag er í Kina. Í Ølen liggur COSL Innovator, har nógvir Pammarar hava verið í starvi í fleiri mánaðir. PAM hevði einar 20 starvsmenn knýttar at ferðini hjá Innovator frá Yantaii úr Kina til Ølen fyrr í ár, og í løtuni eru 20 Pammarar í starvi umborð á COSL Promoter, ið er triði pallurin av sama slag, ið er ávegis úr Kina til Europa skrivar heimasíðan hjá MEST. Og tá COSL Pioneer kemur á føroyska landgrunnin at bora, eru tveir starvsmenn frá Pam partur av manningini. Talan er um tveir elektrikkarar, ið tað hevur eydnast Pam at fáa umborð í samstarvi við felagið Westcon, sum hevur avtalu um liðuggerð og viðlíkahald av pallinum. "Tað er at frøðast yvir, at føroyingar fáa møguleika til at vera við, nú borurin verður settur í føroyska landgrunnin á áttanda sinni", sigur ein stolt Anja Jacobsen, ið er dagligur leiðari hjá Pam Offshore Service. PAM Offshore Service hevur í løtuni omanfyri 80 starvsmenn úti hjá fleiri ymiskum operatørum í frálandavinnuni. Myndir Anja Jacobsen, dagligur leiðari hjá Pam Jógvan Eliasen, søluleiðari hjá PAM, Rúni Hansen, stjóri hjá Statoil og Mouritz Mohr stjóri í PAM avmyndaðir hjá Pam fyrr í ár.